# SAVNS GULL

**Ársfrágreiðing**

2022

## Innihald


| | |
|---|---|
| Føroya fólks miðlasavn | 3 |
| Søgugongd fyri verkætlanina | 4 |
| Pappírsparturin | 6 |
| Ljóðparturin | 8 |
| Sjónvarpsparturin | 10 |
| Savnandi savnsdagur | 11 |
| Fíggjartøl | 12 |
| Fólkið í SavnsGulli | 14 |


SAVNS
GULL

# Føroya fólks miðlasavn – okkara savn, har vit finna okkum sjálv!

SavnsGullið er tilfeingi, sum kann menna okkara vitan, samleika og søgu um Føroyar, og menna okkum sum føroyingar.

Kringvarpssavnið goymir ein heilt serstakan og stóran part av Føroya søgu frá 6. februar 1957 og fram til dagin í dag. Í savninum eru frásagnir um nærum alt, sum er farið fram í Føroyum innan fyri nærum øll øki, og tað er miðlað óheft. Nýtt tilfar verður hvønn dag gjørt, og savnið veksur á henda hátt, og okkara søga verður varðveitt til eftirtíðina.

Tað er tann eldri parturin av kringvarps-savninum, sum verkætlanin SavnsGull skal talgilda, soleiðis at tað kann varðveitast til eftirtíðina.

Eldri parturin av kringvarpssavninum fevnir um oman fyri 520.000 pappírsskjøl, 26.500 útvarpsbond og 14.000 sjónvarpsbond.

Júst hetta savnið er tilfeingi, sum kann gerast heilt serligur partur av okkara gerandisdegi. Tilfarið lýsir okkara samfelag í samtíðini við ljóði og livandi myndum. Um vit lofta møgu-leikanum at gera hetta savnið atkomuligt hjá øllum føroyingum, og um vit megna at finna rætta háttin at gera skattin tøkan, kann hetta gerast eitt tað mest týðandi savnið fyri okkara samleika sum føroyingar.

Okkara savn, har vit finna okkum sjálv!

# Søgugongd fyri verkætlanina

**Umframt at bandasavnið skal bjargast, stendur í public service-sáttmála frá 1. januar 2017, at verkætlanin SavnsGull hevur til endamáls [...] at gera tilfarið atgeingiligt fyri borgaranum.**

Tosað var um at bjarga útvarps- og sjónvarpssavninum, áðrenn Kringvarpið var sett á stovn. Longu í 2002, meðan Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya enn vóru tveir atskiltir stovnar, var skriv at lesa í Dimmalætting, at nú vóru bondini um at forfarast.

Í 2010 kom ein frágreiðing við eini meting um savnið. Millum annað var mett um, hvat kravdist fyri at bjarga pørtum av savninum: 2,7 milliónir krónur um árið í 10 ár, sum hevði við sær, at ljóðbond og sjónvarpsbond kundu bjargast.

Eitt týðandi stig at bjarga tilfarinum kom undan kavi, tá ið verklagslógin at byggja út kringvarpshúsið var fyri í fíggjarnevndini í mai 2013. Fíggjarnevndin skrivar í áliti sínum, dagfest 3. mai 2013, soleiðis um bandasavnið:

Fíggjarnevndin heldur, at nú útbyggingar verða framdar, er neyðugt samstundis at taka støðu til, hvussu bandasavnið í Kringvarpinum verður varðveitt. Fíggjarnevndin heldur tí, at landsstýrismaðurin til fíggjarlógina fyri 2014 eigur at fyrireika eina skipaða gongd, so ferð verður sett á varðveitslu av bandasavninum frá 1. januar 2014. Landsstýrismaðurin eigur saman við Kringvarpinum at umhugsa, um uppgávan kann bjóðast út. Eisini eigur landsstýrismaður at umhugsa, í hvønn mun uppgávan kann gerast av fólki í vardum starvi.

Í 2013 samtykti løgtingið eina eykajáttan upp á 800.000 kr. Játtanin var nýtt til at fáa tól til vega at talgilda útvarpsbondini við, eins og gamlar bandamaskinur hjá Útvarpinum vóru umvældar til hetta arbeiðið. Í 2014 vóru játtaðar 900.000 kr., so gongd kundi koma á arbeiðið at talgilda savnið. Mass Hoydal var settur sum samskipari. Fyrsta uppgáva hansara var at fáa lýst, hvussu farast kundi til verka. Tingið játtaði eisini verkætlanini 900.000 kr. í 2015, og Mass Hoydal var settur sum leiðari fyri SavnsGull, sum verkætlanin var nevnd.

Tey fyrstu árini fevndi arbeiðið um at talgilda pappírspartin og ljóðpartin. Í 2016 var framtíðin hjá sjónvarpsbondunum greið, har A.P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Møllers Fond til almene Formaal játtaði 5 milliónir krónur.

Í 2017 kom gongd á at talgilda sjónvarpspartin; allir tríggir partarnir í kringvarpssavninum verða nú talgildaðir og varðveittir til komandi ættarlið.

Tá arbeiðið at bjarga savninum í Kringvarpinum var komið í eina trygga legu, kom fyrispurningur frá Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum, um til bar at talgilda ljóðsavnið hjá teimum eisini. Hetta bleiv játtað, og tvey ár seinni var henda uppgávan liðug. Í einum lítlum landi, sum Føroyar eru, er týdningarmikið, at vit arbeiða saman. Hetta hevur verið eitt gott samstarv, har hesin parturin av okkara søgu nú er varðveittur til eftirtíðina.

Umframt at bandasavnið skal bjargast, stendur í public service-sáttmála frá 1. januar 2017, at verkætlanin SavnsGull hevur til endamáls [...] at gera tilfarið atgeingiligt fyri borgaranum. Arbeitt verður við eini ætlan fyri, hvussu Kringvarpið og SavnsGull kunnu samstarva um hetta arbeiðið. Tað er ikki komin nýggjur public service-sáttmáli síðani 2017.

Í 2021 broyttist fíggjarliga grundarlagið hjá SavnsGulli. Sum tað stendur í fíggjarlógini fyri 2021, skal Kringvarp Føroya hava eitt avlop upp á 900.000 kr. – umframt at Kringvarpið hevði fíggjað um 500.000 krónur árliga, skuldi Kringvarpið finna 900.000 krónur afturat. Hetta hevur havt stórar avleiðingar fyri verkætlanina. Fleiri mánaðir av 2022 vóru bert trý starvsfólk í SavnsGulli.

**Eitt týðandi stig at bjarga tilfarinum kom undan kavi, tá ið verklagslógin at byggja út kringvarpshúsið var fyri í fíggjarnevndini í mai 2013.**

# Pappírsparturin

Tíðindaskjølini – pappírsparturin – er tann mest støðuga og samansetta eindin í kringvarpssavninum. Í hesi savnseindini eru nærum øll tíðindi goymd síðani fyrstu útvarpssendingina tann 6. februar 1957 og fram til 1996, tá skrivimaskinan – pappírið – var skift út við telduna. Telduskipan var eisini brúkt fyri 1996, men tá í tíðini vóru øll tíðindi prentað út og goymd sum skjøl. Øll hesi árini er nógv pappír savnað í goymsluni, ið telur væl oman fyri 500.000 pappírsskjøl. Nógv tann størsti parturin er tíðindi, men í savninum eru eisini skráir, veðurtíðindi, KODA-listar og annað tilfar úr Útvarpinum.

KT-deildin í Kringvarpinum hevur ment eina leitiskipan, sum er tøk fyri starvsfólk í Kringvarpinum. Á ein lættan hátt er møguligt at leita fram skjøl um okkara søgu og flokka skjølini innan ymiskar flokkar. Rúgvan av tíðindaskjølum er um helvtina av skjølunum, so eini 250.000, harav innanoyggjatíðindi eru væl oman fyri 100.000 skjøl.

Starvsfólkatalið batnaði aftur móti endanum av 2022, og ferð kom aftur á verkætlanina. Tá alt var talt upp, vóru 45.000 skjøl skrásett. Eftir ætlan skuldu verið skrásett 56.000 skjøl, og úrslitið er tí nakað niðan fyri tað væntaða úrslitið. Eftir umstøðunum hjá SavnsGulli við niðurskurði, má sigast, at væl er komið burturúr hóast alt.

# Talgilding av pappírspartinum



# Ljóðparturin

Útvarpsbondini goyma nógvar ymiskar sendingar, eitt nú frásagnir, reportasjur, fyrilestrar, barnaútvarp og mangt annað. Í uppteljingini frá 2014 vóru mett at vera 26.846 bond í savninum. Nú verkætlanin líður móti endanum, eru onnur bond komin undan kavi, og saman við bondunum frá Føroyamálsdeildini táttar í 29.000 bond, ið eru talgildað, tá verkætlanin er liðug.

Kringvarpssavnið goymir upptøkur frá fyrsta degi, sent var tann 6. februar 1957. Í 2001 var seinasta ljóðbandið nýtt í Útvarpi Føroya, og síðani er alt tikið upp talgilt á teldu.

Tað er trupult at fáa gomlu maskinurnar umvældar, og at gamlar maskinur ganga fyri er ein altjóða trupulleiki. Orsøkin til hendan trupulleika er, at tað fækkar við serfrøðingum innan fyri hetta økið, og tað er torført at fáa fatur á lutum til maskinurnar.

Í 2022 vóru um 1000 bond eftir at talgilda, men av tí at tað bert er ein maskina eftir, ið riggar, skal støða takast til, hvussu vit fáa seinasta part av ljóðbondunum talgildað og bjargað til eftirtíðina.

Umframt at SavnsGull hevur talgildað ¼ tummabond, har tað eru tvey spor, var funnin ein loysn at talgilda ljóðbond við tumma- og hálvantummabondum, har tað eru upp í átta spor á hvørjum bandi. Eins og onnur format kann tað vera trupult at fáa røttu útgerðina til at talgilda bondini. Franska fyritøkan Vectracom, ið SavnsGull fekk samband við í 2016, hevði røttu útgerð. Hesi bond eru eisini talgildað og komin aftur til Føroya. Eingin veit enn, hvat er á øllum hesum bondum. Tí verður spennandi, tá stundir vera til at fara gjøgnum tilfarið.



# Talgilding av ljóðbondum



# Sjónvarpsparturin

Sjónvarp Føroya var alment sett á stovn 1. apríl 1984. Beint eftir ár 2000 vóru bondini skift út við teldu. Sjónvarpsbondini, ið skuldu talgildast, eru oman fyri 14.000 í tali. Talan er um fleiri ymisk sløg av bondum, ið krevja ymiskar førleikar og útgerð, ið er ring at fáa hendur á.

Í 2016 kom stuðul frá A.P. Møller og Hustru Chastine Mc-Kinney Möllers Fond til almene Formaal upp á fimm milliónir krónur. Við hesari upphæddini var møguligt at talgilda øll bondini, sum eru í varðveitslu í kringvarpssavninum.

Arbeiðið hevur gingið skjótt og væl. Fyrst var farið undir at arbeiða við tí elsta partinum, sum er goymdur á U-Matic-bondum. Eftir at fyritøkur fingu í boði at bjóða upp á arbeiðið at talgilda sjónvarpssavnið, var avgjørt, at fyritøkan Memnon í Belgia skuldi fáa uppgávuna.

Eftir at bond eru gjørd klár og pakkað til ta longu leið, eru tvey starvsfólk úr SavnsGulli, sum eru farin avstað úr Føroyum við bondunum. Hetta er tann tryggasti, bíligasti og besti mátin at fara við bondunum til Belgia. Øll bond, ið kundu bjargast, eru nú talgildað, og í 2022 komu tey seinastu bondini úr savninum aftur til Føroya. Sjónvarpsparturin er bjargaður.

Eins og tað er sæð fyrr, eru fleiri bond komin undan kavi, og tí var farið ein túr afturat til meginlandið Europa við bondum. Har vóru bond í ymiskum formatum, har ringt var at skaffa maskinur, soleiðis at tilfarið á bondunum kundi bjargast. Tá øll bondini vóru pakkað, og tá farið var umborð á Norrønu, var enn ivasamt, hvør kundi talgilda summi format. Men tá skipið legði at í Danmark, var ein teldupostur komin um, at fyritøkan Memnon hevði funnið maskinur til øll bondini. Samstarvið við belgisku fyritøkuna hevur verið so mikið gott, at Memnon fekk uppgávuna. Tað var ein lætti, at alt kundi talgildast hjá hesari fyritøkuni.

**Øll bond, ið kundu bjargast, eru nú talgildað, og í 2022 komu tey seinastu bondini úr savninum aftur til Føroya. Sjónvarpsparturin er bjargaður.**






# Savnandi savnsdagur

**Savnandi savnsdagurin savnaði ikki bert savnsfólk saman, men í góðveðrinum funnu nógv fólk sær leiðina oman í kringvarpsforhøllina, ið var fullsett.**

Savnandi savnsdagur er sprottin burtur úr spurninginum: Vita fólk í grundini, hvørjum verður arbeitt við í einum savni, og hvønn týdning arbeiðið hevur fyri almenningin?

Bárður á Steig Nielsen, løgmaður, setti dagin. Sum brúkarar av søvnum vóru Bergur Djurhuus Hansen og Annika Sølvará boðin at siga sína hugsan um søvn í dag. Umboð fyri søvnini í Kringvarpi Føroya, Landsbókasavninum, Tjóðskjalasavninum, Føroya Listasavni og Tjóðsavninum greiddu frá arbeiðinum hjá søvnum í dag. Hóast søvn hava sama arbeiðssetning, sum tey hava havt í nógv ár – at savna, skráseta, varðveita, miðla og granska, var heilt greitt, at søvn standa yvir fyri stórum broytingum, nú talgildi heimurin gevur okkum stórar møguleikar.

Tað gjørdist týðiligt, at søvn kunnu fáa ein heilt serligan týdning í framtíðini, um tey opna søvnini á alnótini og geva okkum øllum atgongd til tann dýrgrip av vitan, ið er í søvnunum.

At enda var ein serlig hending. Tjóðsavnið fekk handað ein serligan lut, sum myndar koronutíðina og loysnir, ið vit sjálv funnu við stuttum skotbráði. Tað var “koronustongin” við mikrofon og einari hálvhosu fyri at verja ljóðið ímóti vindi. Hetta var ein loysn, ið Tórður Mikkelsen, sum hevur sendingina Við Tórði á túri, fann beinanvegin eftir, at Kringvarpið setti umfatandi átøk í verk fyri at verja ímóti smittuni. Hendan loysnin slapp uttan um forboðið at fara út við mikrofon.

Hesin gripur er nu í varðveitslu á Tjóðsavninum, ið myndar eina tíð, sum vit flest enn minnast sera væl.

– Hetta er eitt dømi um, at okkara søga verður skrivað alla tíðina, segði Herleif Hammer, stjóri á Tjóðsavninum.

# Fíggjartøl

| SAVNSGULL | 2014-2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 5.970 | 1.387 | 1.173 | 1.185 | **9.715** |
| Keyp av vørum og tænastum | 1.798 | 235 | 217 | 45 | **2.296** |
| Keyp av útbúnaði | 257 | 7 | 17 | 5 | **286** |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 98 | 9 | 8 | 4 | **119** |
| | **8.123** | **1.638** | **1.416** | **1.239** | **12.415** |

| KRINGVARP FØROYA | 2014-2019 | 2020 | 2021 | 2022 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.431 | 197 | 157 | 46 | **1.830** |
| Keyp av vørum og tænastum | 37 | 6 | 5 | 4 | **52** |
| Keyp av útbúnaði | 146 | 0 | 0 | 0 | **146** |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 0 | 0 | 0 | 0 | **0** |
| | **1.613** | **203** | **162** | **49** | **2.028** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tilsamans** | **9.737** | **1.841** | **1.578** | **1.288** | **14.443** |

*Útreiðslur í tkr.*



| | 2014-2019 | % | 2020 | % | 2021 | % | 2022 | % | Tilsamans | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Serstøk játtan á fíggjarlóg | 5.306 | 54% | 900 | 49% | 0 | 0% | 0 | 0% | **6.206** | **43%** |
| Inntøkur frá sølu | 299 | 3% | 0 | 0% | 0 | 0% | 0 | 0% | **299** | **2%** |
| Stuðul frá A.P. Møller-grunni | 2.373 | 24% | 388 | 21% | 402 | 25% | 27 | 2% | **3.190** | **22%** |
| Rakstrarjáttan hjá KVF | 1.759 | 18% | 552 | 30% | 1.176 | 75% | 1.261 | 98% | **4.749** | **33%** |
| **Tilsamans** | **9.737** | | **1.841** | | **1.578** | | **1.288** | | **14.443** | |

*Útreiðslur í tkr.*

# Fólkið í SavnsGulli

## Starvsfólk í SavnsGulli 2022

**Anna Gray**
Skrásetari

**Ari Bjarkason**
Skrásetari og talgildari

**Bára Svabo Persson**
Skrásetari og talgildari

**Bjørg Jacobsen Ellingsgaard**
Skrásetari

**Bjørn Hentze Bech**
Skrásetari

**Bjørt Hvidbro**
Skrásetari

**Finnur Højgaard**
Skrásetari

**Guðrið Jacobsen**
Skrásetari

**Jastrið Johanna Højgaard Poulsen**
Skrásetari

**John Sigurd Hammer**
Skrásetari

**Mass Hoydal**
Verkætlanarleiðari

**Randi Sundberg Michelsen**
Skrásetari








Myndir frá Savnandi savnsdegnum 2022

SAVNSGULL

kvf.fo/savnsgull